## VIÐMERKINGAR

# Vinmaðurin Frank

HELGI ABRAHAMSEN
Lesandi



**Hvørja ferð tá eg síggi, at Høgni Hoydal hevur eina av sínum longu greinum í bløðunum, lesi eg við størsta áhuga, tí eg veit, at hann brúkar altíð langar greinar, tá hann skal snara veruleikanum á høvdið. Tað dugir Høgni nevniliga sera væl, men tað krevur altíð eina langa grein, um tann ætlanin skal eydnast til fulnar. Tað er hetta sum ger, at tær longu greinarnar hjá Høgna Hoydal eru nógv betri enn tær stuttu, sigur Helgi Abrahamsen**

Sosialurin hevði millum jóla og nýggjár eina samrøðu við Frank Jensen, har hesin kom við sera álvarsomum ákærum ímóti Fullveldislandsstýrinum og serliga Høgna Hoydal, sum var landsstýrismaður í umrødda tíðarskeiði. Ákærurnar vóru somikið álvarsamar, at Høgni Hoydal kundi ikki lata tær fara ósvaraðar aftur við borðinum, og tað gjørdi hann heldur ikki. Í bløðunum í farnu viku kom hann við eini viðmerking. – Eini av teimum longu.

### Soleiðis verður alt vent á høvdið

Fyrst nýtir Høgni eina yvirskrift og ein inngang, sum eru vend beinleiðis ímóti Frank Jensen, men síðani lýsir hann vápnahvíld á tí frontinum, og fer at skriva um sítt fantastiska vinalag við henda góða Frank. Vit fáa at vita, at teir práta javnan saman, skemta og støkka inn á gólvið hjá hvørjum øðrum (sum heild ein hugnalig frásøgn).

Tá hetta er fingið upp á pláss verður avdúkað, at teir báðir (Høgni og Frank) hava tosað saman um samrøðuna, sum stóð í Sosialinum. Við hesum fær Høgni lesaran at trúgva, at eingin kennir søguna í Sosialinum betur enn hann. Hann er eitt slag av »ovasta tulkingarmyndugleika«, hvat greinini viðvíkur, og her hevur hann rættiliga frítt spæl, tí neyvan man nakar fara at ringja til Frank Jensen fyri at kanna eftir, um alt er júst so sum Høgni sigur tað vera.

Í næsta broti í greinini er Høgni Hoydal millummaður millum Frank Jensen og Sosialin. Vit fáa nú at vita, hvat Frank Jensen royndi at siga við blaðmannin, og hvussu hann (altso Frank) ímyndar sær, at blaðmaðurin skilti boðskapin. Men Frank Jensen verður misnýttur av Sosialinum (sigur altso Høgni Hoydal), tí tað sum Sosialurin skrivar, er ikki tað sum Frank Jensen ætlaði at siga. Tað veit Høgni betur enn øll onnur, tí hann kennir Frank og hevur tosað við hann.

Og nú er málið fullkomiliga koppað á høvdið, tí nú er tað Høgni Hoydal, sum verjir »vinmannin Frank« ímóti tí óseriøsa Sosialinum, sum... – ja hvat var tað nú hann gjørdi? – jú blaðmaðurin gloymdi at ringja til Høgna Hoydal og biðja um eina viðmerking til samrøðuna, áðrenn hon varð sett á prent. Tað sigur Høgni, at Frank heldur at Sosialurin átti at gjørt.

Jú hetta er skemt á høgum støði.

### Sosialar betringar

Men tað sum fekk meg at taka penn í hond er brotið í greinini hjá Høgna, har hann sigur, at meðan fullveldissamgongan sat og minkaði blokkstuðulin, hendu størstu sosialu betringar í Føroyum í mong ár og stættarmunurin minkaði. Hetta er eisini at venda tingunum á høvdið.

Eg kundi í hesum sambandi hugsað mær at fingið at vita ítøkiliga, hvørjar sosialar betringar hendu í Føroyum í tíðarskeiðinum frá 1. januar 2002, tá blokkstuðulin minkaði, til fullveldislandsstýrið legði frá sær í desember 2003?

Kann Høgni Hoydal eisini siga okkum, hvussu fíggjarstøðan (og harvið útlitini fyri framhaldandi sosialum betringum) broyttust í sama tíðarskeiði? Hvussu stórt var avlopið hjá landskassanum í 2001 (áðrenn blokkniðurskurðin) og hvussu stórt var tað í 2003 (aftan á blokkniðurskurðin), og hvussu stórt hevði tað verið, um allur blokkstuðulin hevði verið tikin burtur?

### Alternativa fíggjarlógaruppskotið

Tjóðveldisflokkurin gjørdi í heyst eitt alternativt fíggjarlógaruppskot. Hvørjar sosialar betringar eru at síggja í tí uppskotinum, og hvussu stórt er landskassaavlopið í 2006 sambært sama uppskoti?

Um blokkstuðulin ongan týdning hevur fyri sosialu vælferðina í Føroyum, hví skjýtur Tjóðveldisflokkurin so upp í alternativa fíggjarlógaruppskotinum, at blokkstuðulin ikki skal minka við so mikið sum einari krónu í 2006? Hvussu stórt hevði avlopið verið í uppskotinum, um blokkstuðulin hevði verið tikin burtur av inntøkusíðuni, og hvønn týdning hevði hetta havt fyri sosialu vælferðina?

Um vit ímynda okkum, at Tjóðveldisflokkurin broytti sítt alternativa fíggjarlógaruppskot soleiðis at blokkstuðulin bleiv tikin burtur, hvar kundi flokkurin so hugsað sær at spart, soleiðis at sparingin á ongan hátt gekk útyvir sosialu vælferðina hjá føroyingum? Kann Høgni tryggja Føroya fólki, at tað ikki hevði gingið útyvir tey veikastu í samfelagnum, um sparingar fyri meira enn 600 mió. krónur skuldu verið gjørdar í sambandi við at blokkstuðulin bleiv burtur?

Nógvir aðrir spurningar kundu verið settir í hesum sambandi, men fyribils hevði tað verið gott, um Høgni hevði kunnað svarað hesum fáu spurningunum. Og so kundi hann eisini í sama viðfangi sagt okkum, um hann veit, hvar hasi bondini við Frank Jensen blivu av.

*helgia@logting.fo*

# Keltringur heilsar Keltringi

SÍMUN H. JENSEN
Tvøroyri

**Nú um degini skrivar tingmaður Tjóðveldisfloksins, tingmaðurin uttan nakran formellan valpost, Torbjørn Jacobsen, grein í Sosialinum um sambandstingmannin Johan Dahl**

Tá ið eg hevði lisið greinina, kom mær til hugs orðini í yvirskriftini.

Lat meg loypa allan volapykkin í greinini yvir og heldur halda meg til yvirskriftina. Bæði Torbjørn Jacobsen og Johan Dahl eru fallittpersónar frá 80-árunum. Lat meg fyrst byrja við tí fyrra.

Reiðaravirksemi hjá Torbjørn Jacobsen og vinmonnum hans byrjaði við, at hesir við einum coastara fingu sær ein av heimsins bestu sáttmálum við danska felagið KGH, har danskir yvirvaldsmenn ráddu, og grønlendingar máttu gjalda gildið.

Ein danskur klerkur, sum seinni gjørdist stjóri í KGH, var nú besti vinur Torbjørns og faðir hans.

Soleiðis ríkaðu hesir menn seg upp, har grønlendingar goldu heimsins hægstu frakt, í hesi glæstrutíð, hekk neyvan myndin av Che í messuni á »Norðvíksingi«. Um nakar hevur livað væl av at avmóða fólk, sum enn liva í koloniveldi, so er tað feðgarnir Jacobsen. Tá ið skútan stóð á turrum, tá var liðugt við vinskapinum, sum hevði vart frá klerki til stjóra.

Eginpeningurin til skipini, Norðlandia og Vestlandia var fíggjaður av Sjóvinnubankanum, hesin banki var sjálvtøkuborð teirra, ikki tí, teir vóru ikki aleinaðir? Jákup Joensen skifti politiska kápu frá radikalum sjálvstýri til samband, fekk eisini svartkalvaloyvið og havtaskuloyvið frá Edmundi fyri at koma inn í sambandsmyrkrið. Henda avhoppan komst av, at Sjóvinnubankin, sjálvtøkuborð hans, ikki longur lat hann fáa alt, sum hann var vanur at biðja um og altíð fekk. Hin Jákup O., fekk 5 mill. fyri avhoppan frá kristnum til radikalt sjálvstýri, men hesir pengar vóru úr framtaksgrunninum. Øll trý skipini ruku, atgongd til sjálvtøkuborðið var nú stongt. Eftir var bert hatur til teir, sum stongdu sjálvtøkuborðið. Sjóvinnubankin og føroyski skattgjaldarin mistu yvir 100 milliónir av mistøkum, sum feðgarnir Jacobsen gjørdu, saman við besta vini, tí nú kámaða sambandsoraklinum, Bjørn á Heygum.

Hvat var nú til ráð at taka, nú ongin brúgv var at standa á og rópa niður á teir, sum fingu hálva løn og biðja teir finna okkurt til døgurða, lesarin skilur hetta ikki? men tað ger tú Torbjørn. Neyvan mátti tú hugsa um døgurðan, tá tú skrivaði í grein tíni um at skilja milllum tað sum var títt og annans. Jú, nú var at hyggja til beiggja hans, at finna sær annað far, enn var sjálvtøkuborðið ikki stongt. Jú mín sann var eitt til keyps í fútarættinum, og hvør møtti upp við bankagaranti í lummanum, jú besti vinur, Bjørn á Heygum, hann kundi bjóða líka til feðgarnir Jacobsen aftur áttu eitt skip. 36 milliónir var prísurin, sjálvt árábarar, sum bjóðaðu, sleptu við 23 milliónum, tað var ein føroyingur, sum starvaðist hjá mærsk sale, sum ikki helt, at tað var ráðiligt at fara upp um 23 mill. hesin kendi jú alt til hvat eitt skipaslag, sum hetta kundi sigla inn av peningi. Men hvat visti hitt nú kámaða sambandsoraklið, Bjørn á Heygum, um, hvat eitt skip kundi sigla inn av peningi, bert persónurin var løgfrøðingur, so hildu menn at hann visti alt, men tíverri, var hetta ofta orsøkin til at skip og feløg fóru á heysin. Stutta tíð eftir keypið kom skútan, sum nú var reyðmálað, stevnandi inn á havnarvág. Stórt gildi varð hildið umborð, myndir av skútuni vóru givnar sum gávur, til minnis um skilakeyp. Og so hendir tað, sum árábar spáddu, tað gekk ikki. Tá 2 ár vóru liðin, lá skipið svínabundið í Hirtshals.

Á fremstu síðu í Dimmalætting stóð at lesa, hvussu nógvar milliónir sjálvtøkuborðið misti. Men nú bleiv bananin aftur skrellað, hon kostaði nú 13 mill. Sjálvtøkuborðið var nú farið fallit, men sovorðnir menn hava konto í nógvum peningastovnum, so reyðmálaða skútan kundi aftur stevna út á Atlants breiða hav. Gott er at vera sparin, men at enda á havsins botni av slíkum kleyvarskapi er ikki sjómansskapur.

Tá siglt verður við norsku strendur, er tað ein sannroynd, at tveir mans eru á brúnni, skipari og stýrimaður, tá umstøðurnar eru vánaligar.

Torbjørn Jacobsen var aleinaður á brúnni, rendi á, so skútan fór til botns, orsøkin til at hann var aleinaður, var hon, at stýrimaðurin skuldi hava yvirtíð, og hetta vildi hann ikki, hann fylgdi gomlum siði í Kenn skipanini.

Men tryggingarpengar eru góðir at fáa, so nú var at leita eftir nýggjum fari. Hesaferð var tað ein gamal trolari, hann fekk abbasa navn, farmasiglingin var nú vorðin ein marra, so best var at fáa sær fong frá havsins botni, heldur enn tann, sum stóð á bryggjuni. Men tíðin er ein náðileysur fíggindi, fiskiskapurin eftir reiða gullinum, varð farin, so skútan við abbasa navni liggur nú svínabundin. Lesarin kann sjálvur ímynda sær, hvussu nógvar pengar Bjørn á Heygum hevur fingið øll hesi árini, hann var ráðgevi og nevndarlimur.

Ja, Torbjørn, løgtingslimur, uttan nakran formellan valpost, rukkulívið frá 80-árunum var stórt. Á den substansur.

W W W . S O S I A L U R I N . F O